# Tiltøk

**Samkoman Marknagil Fjalsgøta 2, Tórshavn**
Mánakvøldið kl. 20 Bønar/uppbyggingarmøti.
Øll eru hjartaliga vælkomin

**Argir, Kirkju- og missiónshúsið**
Týskvøldið kl. 20 Argjakórið venur. kl 20.30 Ungdómsmøti.
Hóskvøldið kl. 20 Bíbliutími.
Sunnukvøldið kl. 18 Møti - DBI vitjan v/ Hertu og Bergi Johannesen, Keypmannahavn

**Frelsunarherinum Tórshavn**
Mánadagin kl. 17 Úlvar. Kl. 19 Skótar. Kl. 20 Streingjakórið venur.
Týsdagin kl. 20 Hornvenjing
Mikudagin kl. 15 Bønarmøti kl. 19 Cellegruppa fyri menn, verður í Gæsugøtu 1
Hósdagin kl. 20 Heimaforbundi. Vitjan av Major Anne Kristine Herje. Hon hevur verið offiserur í Haiti í mong ár, og er nú heima í Føroyum, og hon kemur at hava andakt á Heimaforbundinum. Heimaforbundi er fyri kvinnur í øllum aldri.
Leygardagin kl. 19.30 Aglow
Sunnudagin kl. 11 Halgunarmøti v/ Anne Kristinu Herje og Toril Waag Olsen. Kl. 11 sunnudagsskúli. Kl. 17.30 bøn. Kl. 18 møti. Tað er Heimaforbundsdagur, og gávan gongur til arbeiði á Haiti. Major Anne Kristina Herje talar á møtinum.

**Fríkirkjan Oasan**
Mánakvøldið kl. 20 Møti v/ Fólki frá Åbne døre.
Verið hjartaliga vælkomin.
www.oasan.fo

**Ebenezer**
Mánakvøldið kl. 20 Kvinnumøti. Wanja Petersen kemur at greiða frá einum trúboðanartúri til Asia.
Mikukvøldið kl. 20 Bønar- og lærumøti. Hjørleif Vang tosar um Samson.
Hóskvøldið kl. 20 Ungdómsmøti. Gunnar Nielsen talar.
Sunnudag kl. 11 Minnismáltíð Harrans. Richard Schwartson talar og tey ungu luttaka við sangi, framførslu og øðrum. Barnaansing er meðan møti er. Kl. 12 Sunnudagsskúli. Kl. 18 Evangelisktmøti.
www.ebenezer.fo

**Evangeliihúsið, Tróndargøta**
Mánakvøldið kl. 20 lovsangs- og bønarløta, Steve Dulwich talar. Mikudagin kl. 17.15 Barnakórið venur.
Hóskvøldið kl. 18.30 Mini Salt.
Sunnudagin kl. 11 Familju- og morgunmøtið við sunnudagsskúla.
www.gospel.fo

**Filadelfia**
Mánadagin kl. 07.15 Morgunbøn. Kl. 20 Bønarskúlin.
Mikudag kl. 16.30 Bøn Ísrael og býnum.
Fríggjadag Kl. 07.15 Morgunbøn. Kl. 20 Mammur hittast til bøn.
Leygardag kl. 21 Flare.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, Sam Jacobsen talar. Kl. 13.15 SundagsKool
www.filadelfia.fo

**Meinigheitshúsinum í Havn**
Mánakvøldið kl. 19 Juniormøti
Týskvøldið kl. 20 Bíbliutíni v/ Jógvan Garðsá, Mark.10, 1-27.
Mikukvøldið kl. 20 Felagskóri venur
Hóskvøldið kl. 20 Ungdómsmøti v/ Ejvind Mouritsen, Endatíðin.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli. Kl. 18 Møti v/ Alfred Olsen Nóa.
Øll eru hjartaliga vælkomin

**KFUM og KFUK í Havn**
Mánadagur 20. sept. kl. 15 í KFUK: Seinnapartssamkoman við Randi Petersen.
Týsdagur 21. sept. kl. 17 í KFUK: Várgleði. Fyri juniorar og børn.
Mikudagur 22. sept. kl. 19 í KFUM: Ten-sing kórið kemur saman.
Hósdagur 23. sept. kl. 19.30 í KFUK: KFUK kvøld.

**Missiónshúsið í Skopun**
Mikukvøldið kl. 19.30 bønarløta. Kl. 20 bíbliutími Gal. 3,15-29. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Aglow Sandoy**
Komið verður saman í Samljóð Skopun mánakvøldið kl. 19. Vitjan úr Havn.
Allar kvinnur eru vælkomnar

**Sandavágur**
Sjómanskvinnuringurin kemur saman í Meinigheitshúsinum týskvøldið kl. 20. Allar kvinnur eru vælkomnar.

**Missiónshúsið Libanon**
Sjómanskvinnuringurin byrjar aftur hóskvøldið kl. 20. Jonna Johannessen av Hellunum tosar Jógvan og Jákup Suni syngja. Allar kvinnur eru vælkomnar

**Saron, Vestmanna**
Týskvøldið kl. 20 Møti, Steve Dulwich talar.
Sunnukvøldið kl. 18 Møti, kaffi/smyrjubreyð aftaná.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Kollafjarðar Missiónshús**
Bíbiltími verður týskvøldið kl. 20 v/ Heðin Lamhauge
Ongin bønarløta verður hóskvøldið.
Sunnudagin verður Familjumøti við luttøku úr KFUM & K í Klaksvík. Náttturði verður aftaná
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Hjúnabandsskeið við Steen Palmqvist**
Fríggjadagin 15. okt. og leygardagin 16. okt., hevur Steen Palmqvist hjúnabandsskeið í Kelduni í Skálafirði. Kostnaðurin er 200,- kr. fyri hvønn íroknað døgurða og drekka. Tilmelding á tlf. 742054, 581512 og á telduposti tvorfoss@kallnet.fo
Sí annars á www.keldan.fo

**Kambsdalur, Handilsskúlin**
Týskvøldið kl. 20 Bønar- og uppbyggingarmøti.

**Missiónshúsið Tabor, Toftir**
Barnaringurin byrjar aftur mikudagin kl. 17.30. Øll børn 5-14 ár eru vælkomin."

**Siloa, Fuglafirði**
Bøn, bíbliulæra og hugnalig samvera við drekkamunni verður í Siloa mikukvøldið kl. 19.30. Høgni Johannesen talar. Øll eru vælkomin.

**Rituvíkar Missiónshúsið**
Mikukvøldið kl. 20 Bønarmøti.
Hóskvøldið kl. 19 Juniorringur.
Leygarkvøldið kl. 20 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli. Kl. 18 Møti.

**Soli Deo Gloria**
Mánakvøldið kl. 20 bønarmøti. Tú ert vælkomin.
Mikukvøldið kl. 19.30 bønarbólkur dreingir
Hóskvøldið kl. 20 ungdómsmøti v/ Mariu Joensen
Sunnukvøldið kl. 18 møti
Mánakvøldið kl. 20 bønarmøti
www.solideogloria.fo

**Aglow klaksvík**
hevur møti á Soli Deo Gloria týskvøldið kl. 20. Marianna Jacobsen vitnar. Allar kvinnur og gentir eru vælkomnar.

**Getsemane, Stangaskákið 1, Klaksvík**
Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti v/breyðbróting.

**Frelsunarherurin Vágur**
Mánakvøldið Kl. 20 heimaforbundi.
Týsdagin kl. 9.30 orðið á borðið.
Mikudagin kl. 14.30 barnakór.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Týskvøldið kl. 20 verður bíbliutími og bønarløta. Evni: Hebrearabrævið 1.

**Tilhaldið í Tórsgøtu**
*tlf. 316491/286491*
*Opið er mánadag – hósdag kl. 9-17 og fríggjadag 9-16*
*tilhald@torshavn.fo*
*Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.*
OBS!!!! Mikudagin 29 sept. Kl. 15-17 er Tilhaldið við í tiltakinum, ið Navia skipar fyri á torginum í SMS. "Ungur nemur gamal fremur" Kom og lær ungdómin at binda og hekla. Tilmelding: 316491.
Skeið:
Matgerð týsdag kl. 10-13.30 Inga E. Torbjørnsdóttir byrjar í viku 39. Skeið er undir Tórshavnar Kvøldskúlaskipanin. Telduskeiðini verða lýst seinri.
Fríggjadagur
Kl. 9-17 Motiónsrúmið opið
Kl. 9.30 Fimleikur menn, Dánjal Húsgarð. Allir menn eru hjartaliga vælkomnir.
Kl. 10 Bindiklubbur.
Kl. 14-16 Prát.
Mánadagur
Kl. 9 Horn- og beinarbeiði. Tilmelding: 316491
Rasmus Nygaard. Støkk inn á gólvið og vita um hetta hevur tín áhuga.
Kl. 9-17 Motiónsrúmið opið. Í motiónsrúminum er rógvimaskina, kondisúkkla, renniband og krossari.
Kl. 10 Fimleikur fyri kvinnur, Greta Ellingsgaard. Allar kvinnur eru vælkomnar.
Kl. 11 Enskt talumál.
Kl. 14 Kortspæl og onnur spøl.
Týsdagur
Kl. 9-17 Motiónsrúmið opið kl.9-10 er vegleiðing, Arnhold Fjallstein.
Kl. 10 Vit syngja, Árni Hansen. Øll eru hjartaliga vælkomin
Kl. 15 Prát.
Mikudagur
9-17 Motiónsrúmið opið
Kl. 9 Horn- og beinarbeiði. Tilmelding: 316491. Rasmus Nygaard. Støkk inn á gólvið og hetta hevur tín áhuga.
Kl. 9 Veving. Tilmelding: 316491, Joana Bjarnastein
Kl. 9 Maskinbinding. Tilmelding: 316491, Marita Guttesen.
Kl. 9.30 Fimleikur menn, Dánjal Húsgarð. Allir menn eru hjartaliga vælkomnir.
Kl. 10 Bindiklubbur.
Kl. 14 Bindiklubbur
Kl. 15 Túrur: Tunglifjall, Jóhann G. Danielsen. Hittast í Tilhaldinum. Øll eru vælkomin.
Hósdagur
Kl. 9-17 Motiónsrúmið opið
Kl. 10 Fimleikur fyri kvinnur, Greta Ellingsgaard. Allar kvinnur eru vælkomnar.
Kl. 14 Boccia í kjallaranum, Alma Poulsen. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Fríggjadagur
Kl. 9-17 Motiónsrúmið opið
Kl. 9.30 Fimleikur menn, Dánjal Húsgarð. Allir menn eru hjartaliga vælkomnir.
Kl. 10 Bindiklubbur.
Kl. 14-16 Prát.

**Blákrossbúðin Kongagøta 10, Tórshavn**
Tekur ímóti góðum klæðum, Opið er: mánadag – fríggjadag frá kl 10-12 og 14-17.30 og leygardag frá kl 11-14.
Blái Krossur hjálpir fólki í Føroyum við rústrupuleikum.

**Blákrossbúðin Heiðavegur 32, Tórshavn**
Tekur ímóti góðum klæðum. Opið er: mánadag – fríggjadag frá kl 13-17.30 og leygardag frá kl 10-13.
Blái Krossur hjálpir fólki í Føroyum við rústrupuleikum

**Pensionistafelagið í Havn**
*Limirnir koma saman í Losjuni, Tinghúsvegur 18, mikukvøld kl. 19, tá ikki annað er lýst. Tlf. 222733*
*finnurj@post.olivant.fo*
Vit hittast í Losjuni mikudagin 22. sept. kl. 19. Mina Reinert sigur frá tíðini vesturi í Vágum, tá hersetingin var 1940-1945.

**Losjan í Havn, Tinghúsvegur 18**
Fríggjadag kl. 15 hittast tilkomin og eldri til hugna.

**Dagtilhaldið í Nólsoy**
er opið mánadag, týsdag og hósdag frá kl. 13-17. Øll eru hjartaliga vælkomin

**Dagtilhaldið í Gøtubrá**
Vit eru farin í summarferiu.

**Dagtilhaldið í Runavíkar Kommunu**
*Vit halda til í húsinum hjá Nón á Torvgøtu 2, Saltangará. Opið er mánadag til hósdag frá kl 14-17.*
Høvi er at gera ymiskt handaligt arbeiði, spæla kort, boccia og onnur spøl. Týsdag er fimleikur/styrkivenjing. Bløðini eru til taks og ein góður drekkamuður. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Listasavnið á Sandi**
*Listasavnið er opið týsdag til sunnudag kl. 14-16. Mánadag er stongt.*
Annars er opið eftir nærri avtalu, ið fæst við at ringja til Listasavnið á Sandi á tlf. 211924. Atgongugjald kr. 40,-

**Tilhaldið Hugnin í Sandoy**
*hevur opið mánadag og mikudag frá kl. 13 til 17. Báðar dagarnar er drekkamuður at fáa. Øll eru hjartaliga vælkomin.*
Mikudagin 22. sept. Vit pakka jólapakkar til Christmas Child. Øll eru vælkomin.

**Dagtilhaldið á Toftum**
*Opið er hesar dagar: týsdag, mikudag og hósdag frá kl. 15 til 18.*
*Øll eldri eru vælkomin*

**Dagtilhaldið í Fuglafirði**
Vit eru farin í summarferiu.

